# Suðuroyingar mugu sleppa av við Føroya Fiskavirking

**– Arbeiðið á virkjunum hjá Føroya Fiskavirking í Suðuroy bara minkar og minkar, men hetta er ein heilt natúrlig gongd, soleiðis sum skipanin er, sigur leiðarin á Fiskamarknaði Føroya**

FISKAVIRKING OG SUÐUROYGGIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Verður Fiskavirking privatiserað, so at onkrar stórfyritøkur keypa fyritøkuna, eri eg púra sannførdur um, at virkið á Tvøroyri verður stongt beinanvegin, sigur John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya. Hann er eisini valevni til Løgtingið fyri miðflokkin í Suðuroy*

– Einasta bjargingin hjá Suðuroynni er at sleppa sær av við Føroya Fiskavirking og at fáa beinleiðis flutning aftur úr Suðuroynni niður til Skotlands.

Tað heldur John Nielsen, leiðari á Fiskamarknaði Føroya.

Hann sigur, at síðani Føroya Fiskavirking varð stovnað, hevur tað miðvíst minkað um sítt virksemi í Suðuroy.

John Nielsen leggur tó dent á, at hetta er ikki ein ákæra ímóti Føroya Fiskavirking.

– Soleiðis sum øll skipanin er skrúvað saman, er Suðuroyggin meiri og minni ein kleppur um beinið á Fiskavirking og var eg stjóri har, hevði eg gjørt akkurát tað sama.

Sostatt skilir hann ógvuliga væl leiðsluna í Fiskavirking, tí soleiðis sum støðan er, hevur hon ikki annað val, skal Fiskavirking rekast fullgott.

– Tað er júst hetta, sum er grundarlagið undir fríu marknaðarkreftunum, at kapitalurin, og sostatt vinnan, skal søkja har sum avkastið er størst. Tískil er tað ein heilt natúrlig gongd at Fiskavirking miðsavnar meiri og meiri arbeiðið í miðstaðarøkinum.

### Mugu sleppa av við Fiskavirking

John Nielsen er ein av teimum, sum bjóðar seg fram til Løgtingsvalið 20. januar.

Hann er av Tvøroyri og er stillar upp fyri miðflokkin í Suðuroy.

Vinna og vinnulív hava hansara stóra áhuga og herfyri hevði miðflokkurin í Suðuroy kallað saman til fundar, har John Nielsen hugleiddi um Suðuroynna í vinnuligum høpi.

Og hann er púra sannførdur um, at ein avgjørd fortreyt fyri, at Suðuroyggin skal mennast aftur á vinnuliga økin um, er at suðuroyingar sleppa av við Føroya Fiskavirking.

Hann sigur, at tað fyrsta Fiskavirking gjørdi eftir at tað varð stovnað, var at lata virkið í Vági aftur.

– Og á virkinum á Tvøroyri er virksemið alsamt minkað og nú er tað bara ein viðfáningur av tí, sum tað einaferð var. Frá at vera eitt stórt virkið, er virkið á Tvøroyri nú ikki meiri enn eitt miðalstórt virkið, ella kanska enntá eitt lítið virkið.

Hann vísir á, at tilsamans er fiskaarbeiðið í Suðuroynni minkað niður í helvt hesi seinastu 15 árini.

– Tá ið flakavinnan í Suðuroy var í hæddini, tóku virkini í Vági, á Tvøroyri og í Hvalba ímóti einum 20.000-25.000 tonsum um árið, men nú er ikki meiri enn helvtin eftir.

Hann leggur afturat, at tað leypir í eyguni, at av øllum bátunum, sum er í Suðuroy, eru tað næstan ongir bátar, sum avreiða í Suðuroynni.

Umframt bátar úr Suðuroy, vóru tað eisini nógvir aðrir bátar, sum avreiddu at kalla fast í Suðuroy.

Men teir eru eisini burtur.

– Tað er ikki bara tað, at teir eru burtur úr Suðuroynni. Tað er enntá rættiliga sjáldsamt, at teir avreiða í Føroyum yvirhøvur, tí nógv teir flestu túrarnar eru teir uttanlands. Onkrir av bátunum, hava avreitt í Føroyum í næstan tvey ár.

Hetta er ein støða, sum sigur eitt sindur um, at kappingin um fiskin er ov lítil. Orsøkin til, at kappingin er ov lítil, er, at tað eru ov fáir keyparat. Og eisini tað er ein orsøk til at fáa virkini í Suðuroynni úr Fiskavirking.

### Hoyrir heima í miðstaðarøkinum

John Nielsen vísir á, at Fiskavirking er ein fyritøka, sum er stuðlað við almennum pengum, so tað munar.

– Men Fiskavirking er eisini fyrst og fremst ein fyritøka, sum hevur sítt tilverugrundarlag í miðstaðarøkinum, har tað er lutfalsliga lætt at føra fisk til virkini og frá aftur virkjunum.

John Nielsen sigur, at hinvegin hava fiskavirkini í Suðuroy ein eykakostnað, uppá 30-50 oyru fyri kilo, bara til flutning, og tað er nógv, tá ið hugsað verður um fiskivinnu.

– Tí er tað fullkomiliga skeivt, at Føroya Fiskavirking er í teirri støðu, at, tað er hon, sum skal stýra fiskivinnuni í Suðuroy.

Hann sigur, at hvussu støðan so enn verður vend og snarað, vera virkini í Suðuroynni altíð eitt haft um beinið á Fiskavirking, tí tey liggja so langt burtur og tí at flutningskostnaðurin er so stórur.

– Tí átti Fiskavirking at slept sær av við virkini í Suðuroynni ongantíð ov skjótt, tí tey hoyra ikki heima í Fiskavirking.

Hann sigur, at tað, sum er av allar størsta týdningini er, at virkini í Suðuroynni verða stýrd úr Suðuroynni umframt tað, at beinleiðis flutningur verður skipaður niður á meginlandið.

– Bara við at virkini verða stýrd úr Suðuroynni sjálvari, fæst veruligur vilji til at hava eina rættiliga vinnu í oynni.

Nú hevur Fiskasølan eisini keypt virkið í Hvalba, men har er heldur ikki nógv arbeiði og John Nielsen heldur, at trupulleikin har er tann sami sum á virkjunum, sum Fiskavirking eigur í Suðuroynni.

Men hvat er tað so sum forðar Fiskavirking í at stongja virkið á Tvøroyri?

– Tað er kanska ikki so lætt at siga. men tað er so neyvan av reint vinnupolitiskum orsøkum at virkið á Tvøroyri er opið, tí eg kann ikki ímynda mær annað enn at tað gevur stórt hall. Tað er av øðrum orsøkum at Fiskavirking ikki vil stongja virkið á Tvøroyri. Kanska er tað av politiskum orsøkum, at Fiskvirking heldur lív í virkinum á Tvøroyri.

### Ein vanlukka at selja Teistan

John Nielsen vísir eisini á, at bátarnir, sum vanliga avreiddu í Suðuroy, eru bátar, sum fiska fisk, ið vit plaga at skera til fesk fløk og flyta út.

– Bátarnir hava ikki møguleika at fiska annan fisk. Men síðani skilnaður varð gjørdur ímillum skip og virki, hava virkini í Suðuroyggin mist meiri enn helvtina av fiskinum, tí skipini avreiða aðrastaðni av tí at virkini í Suðuroy keypa ikki.

Og virkini í Suðuroy vóru feskfiskavirkið burturav.

John Nielsen sigur, at virkini gingu hampiliga væl, heilt til Teistin varð seldur í 1996.

– Tá ið Teistin sigldi, var beinleiðis flutningur ímillum Suðuroynna og Skotlands, men tá ið hann varð seldur, mistu Suðuroyggin hendan møguleikan.

John Nielsen ivast ikki í, at hetta er ein høvuðsorsøk til, at gongdin í Fiskivinnuni í Suðuroynni hevur verið so vánalig, sum hon hevur verið hesi síðstu árini tí tá versnaði møguleikin munandi at útflyta feskan fisk beinleiðis úr Suðuroynni niður í Evropa.

Hann sigur, at skal Suðuroyggin mennast aftur á vinnuliga økinum, er einasti máti at fáa skip aftur at sigla beinleiðis ímillum Suðuroynna og Skotlands, so at tað aftur ber til at útflyta feskar fiskavørur í Suðuroynni.

– Harafturat átti Fiskavirking at sloppið sær av við virkini í Suðuroy ongantíð ov skjótt, tí tey liggja so avsíðis at tey eru bara til fortreð hjá Fiskavirking.

– Tað er einasta bjargingin fyri Suðuroynni og eg haldi eisini, at ein almennur grunnur skuldi verðið skipaður, sum kundi stuðla uppundir at sett ymisk virksemið á stovn í Suðuroynni, saman við vágafúsum pengum úr økinum.

Hann sigur, at eftir røttum skuldi Framtaksgrunnurin bara hugsað um at stuðla vinnum í útjaðaranum, men tað hendir júst tað øvugta- at Framtaksgrunnurin stuðlar nógv mest í miðstaðarøkinum.

### Stongja virkið á Tvøroyri

Leiðarin á Fiskamarknaðinum sigur, at nú verður nógv tosað um at einskilja Fiskavirking.

– Tað er tað einasta rætta. Men verður tað Eimskip og aðrar stórfyritøkur, sum eru nevndar í hesum sambandi, sum keypa Fiskavirking, ivist eg onga løtu í, at tað fyrsta, sum hendir, verður, at virkið á Tvøroyri verður stongt.

– Tí haldi eg, at skal tað vera liviligt í Suðuroy, er tað av størsta týdningi at virkini í Suðuroy verða loyst frá Fiskavirking.

John Nielsen samanber í hesum sambandi Suðuroynna og Norðoyggjar.

– Var Kósin ikki uttanfyri Fiskavirking, hevði hon nevyvan verið tað, sum hon er í dag heldur hann.

Men hann leggur afturat, at í Norðoyggum var tað sanniliga ein grunnur, sum stuðlaði royndini at seta ígongd.

– Í Suðuroynni er eitt ávíst arbeiðsloysi. Men suðuroyingar fiska hóast alt nógvan fisk. Tí er tað av størsta týdningi, at virkini í Suðuroy, verða loyst burturúr Fiskavirking.

So kunnu suðuroyingar sjálvir taka um endan, so at fiskurin eisini verður virkaður í Suðuroynni.

Men so er tað samstundis neyðugt at fáa beinleiðis flutning ímillum Suðuroynna og meginlandið í Evropa, so at fiskurin kann flytast feskur av landinum, sigur John Nielsen.

### Harðari kapping

Hann heldur, at tað hevði eisini stimbrað uppundir kappingina um fiskin, tí í løtuni eru tað so fá virki, sum keypa fisk í Føroyum, at kappingin er ikki serliga hørð.

– Men skulu vit útflyta feskan fisk, krevst tað eisini eitt heilt annað søluarbeiðið enn tað, sum vinnan hevur í dag.

Hann dugir ikki at siga, hvussu tað ber til, at søluarbeiðið ikki er raðfest fremri enn tað er. Men ein orsøk kann vera, at tann manglandi kappingin um fiskin ger, at Fiskavirking fær fiskin, tað hevur brúk fyri, mestum av sær sjálvum. Sostatt hava teir heldur ikki brúk fyri tí stóra søluarbeiðnum, tí teir forvinna peningin kortini.

Og víð tí søluarbeiði, sum nú er, koma vit ikki langt við feskum vørum, tí til tað krevst munandi meiri.

– Skulu vit framhaldandi kalla okkum fiskivinnutjóð, er tað skylda okkara at virka fisk. Hava vit ikki álit á, at tað ber til at virka fisk í Føroyum, er tað ein spurningur, um vit ikki bara skulu pakka saman beinanvegin.

– Vit kunnu ikki kalla okkum fiskivinnutjóð og lata bátarnar avreiða uttanlands, sigur John Nielsen.



# Skálafjørðurin fær betrað bussamband

**Nýtt samstarv millum kommunur á Skálafjørðinum og Bygdaleiðir bøtir munandi um bussambandið kring fjørðin.**

SAMFERÐSLA

*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*



*Dánjal Pauli "Piddi" Lamhauge hevur koyrt buss í meira enn 30 ár*

Í áravís hevur ilskan akkumulerað seg millum íbúgvar við Skálafjørðin um eitt ov vánaligt bussamband, at landsins triðstørsta kommuna hevur verið marginaliserað hvat almennari samferðslu viðvíkur. Frá og við tí nýggja árinum er tó ein loysn arbeidd fram av nøkrum av kommununum saman við Strandferðsluni - Bygdaleiðir yvirtaka Skálaleiðina og kombinera hana saman við skúlabussum inn í verandi skipan í einum nýggjum pakka sum Runavíkar, Skála, Oyndarfjarðar, Elduvíkar og Funnings kommunur eru við til at fíggja.

Alt bendir á at talan er um eina munandi betring av tí partinum av ferðaætlanini hjá Bygdaleiðum sum umfatar Skálafjørðin.

»Vit hava lagt nógvar túrar afturat og ikki tikið nakrar túrar burtur," viðmerkti ein tænastupersónur innan fyrisitingina hjá Strandferðsuni. "Lykilin her er samstarvið við kommunurnar.«

»Vit hava roynt at minimera skiftini,« legði keldan hjá Bygdaleiðum afturat. "Bussarnir koyra nú meira runt fjørðin og kundin fær betri tænastu.«

### Toftir og Strendur uppí?

Sum skilst hava broytingarnar leingi verið upp á tal og nógvar klagur hava verið vendar til Bygdaleiðir um sambandið sum tað var. Eysturoyarleiðirnar umboða tí uttan iva ein kærkomnan bata fyri mong ferðafólk.

Hóast Nes og Sjóvar kommunur sum so ikki eru við í tí nýggja samstarvinum um "Eysturoyarleiðirnar" so fáa íbúgvarnir í hesum kommunum ein ágóða í og við at Leið 440/480 nú koyrir millum Selatrað og Toftir. Vissuliga er sambandið betri millum Skála og Runavík, men í prinsippinum skulu Toftir og Strendur eisini kunna koma koma uppí skipanina.

»Vit hava arbeitt hart og leingi fyri at fáa hesa avtaluna í lag,« segði Tummas M. Jacobsen, bygdarráðslimur á Skála. »Royndarkoyringin við Skálaleiðini vísti seg at fáa undirtøku og gav okkum eitt gott støði at arbeiða út frá. Tað sum vit nú fáa er í veruleikanum ein nógv betrað tænasta fyri ein kostnað sum ikki er hækkaður eftirsum vit samstundis ikki longur reka Skálaleiðina.«

»Kontraktin við Skálaleiðina gekk út 1. januar og hetta var eitt høvi at gera nakað nýtt. Vit rokna við at tað nýggja samstarvið við Bygdaleiðir kemur at geva nógvar fyrimunir.«

### Umfatandi umleggingar

Okkurt bendir á at talan er um strukturbroytingar í ferðslumynstrinum.

Leiðarin á fólkaflutningsdeildini hjá Strandferðsluni, Andrass Jensen, ásannar at trupulleikar framvegis finnast í Eysturoyarleiðunum og sipar til Gjógv sum ikki hevur fingið eina nøktandi loysn.

»Vit hava fingið stórar ábøtur í Eysturoy men enn liggur okkurt eftir,« segði Andrass Jensen. »Enn hava vit ikki fingið Gjógv integrerað nøktandi við men vit royna at hyggja upp á tað saman við kommununi.«

»Tað vit síggja er broytingar í ferðslumynstrinum,« legði Andrass Jensen afturat, »Tann stóri spurningurin snýr seg um í hvønn mun Strandferðslan skal røkja og fíggja lokala ferðslu so sum skúlabussar.«

Í einum nýggjum faldara frá Strandferðsluni sum nýliga er útkomin framgongur at Eysturoyarleiðirnar umfata fylgjandi: Selatrað-Toftir / Toftir-Selatrað (440/480), Æðuvík-Rituvík-Runavík-Nes (442), Oyrarbakki-Funningur-Skálabotnur-Oyrarbakki / Oyrarbakki-Runavík-Oyrarbakki / Oyrarbakki-Gjógv-Oyrarbakki (205), Skálabotnur-Oyndarfjørður / Oyndarfjørður-Skálabotnur (481).

Eysturoyarleiðirnar eru fyribils undir royndarkoyring og møguligar broyt-ingar, rættingar ella tillagingar kunnu væntast í sambandi við ta nýggju ferðaætlanina sum skal koma út tann 1. apríl.

# Valdystast frá Eiði til Runavík

Løgtingsvalevnini í Eysturoynni vóru sunnudagin 4. januar saman og løgdu valfundirnar í oynni til rættis. Semja var um at halda valfund á Eiði tann 7. januar, á Kambsdali tann 11. januar og í Runavík tann 15. januar, upplýsa valevnini.

»Hesuferð verða fundirnir skipaðir annaðleiðis enn undanfarna val,« siga Eysturoyar valevnini í einum felags tíðindaskrivi. »Ætlanin er at skipa fundirnar sum panelfundir, har hvør flokkur í trimum umførum sleppur at leggja fram síni sjónarmið og áhoyrarar fáa høvi at seta flokkunum stuttar ítøkiligar spurningar.«

Valfundirnir verða: mikukvøldið 7. januar kl. 19.30 í Ítróttarhøllini á Eiði, sunnukvøldið 11. januar kl. 20.00 í Ítróttarhøllini á Kambsdali og hóskvøldið 15. januar kl. 19.30 í Ítróttarhøllini í Runavík.

